

Mynd: Helge Hansen/Statoil

# Tíggjutúsundtals fara at missa arbeiði í norsku oljuvinnuni

**Jógvan Hugo Gardar**

30.08.2014 - 11:59

Oljan.fo

Norsku oljuarbeiðsplássini hvørva í stórum tali nú. Fakfelagsleiðarin Bjørn Asle Teige segði á ONS-stevnuni at neyðugt er at halda eygu við tí sum hendir, og hann óttast at hópin av størvum hvørva í norsku oljuvinnuni innan heilt stutta tíð.

Teige er høvuðsálitisfólk hjá YS-limunum í Statoil. YS stendur fyri Yrkesorganisasjonenes Sentralforbund.

Hann sigur í samrøðu við Stavanger Aftenblad at longu nú eru eini 3.000 størv burturi, og leggur afturat at hann ikki kann útihýsa at eini 5.000 størv bara hjá Statoil fara at hvørva í Noregi.

Statoil hevur boða frá at størv fara at hvørva, men einki samlað tal er nevnt. Teige sigur at tá øll tølini verða løgd saman, so sær man at niðurskurðurin er ræðandi. Offshore.no hevur nevnt at bara innan arbeiði á boripallum, so fara eini 7.000 størv at hvørva.

Um vit ikki gera ov nógv av, so fara eini 10.000 størv at hvørva í sjálvari oljuvinnuni, og taka vit so øll tey størsvini sum á ymsan hátt gera tænastur fyri oljuvinnuna, so kann talið heilt skjótt gerast 20.000 størv sum hvørva, sigur Teige.

Kunningarstjórin í Statoil, Jannik Lindbæk jr ynskti ikki at gera viðmerkingar til tølini, men leggur sambært Stavanger Aftenblad dent á at hetta skal tryggja kappingarføri hjá Statoil yvir tíð.